# Traðka á kvinnuligar býráðslimir í Havn

**TALIBAN-BÝRÁÐ Í HAVN** Kvinnuligir býráðslimir í Havn eru í øðini um ein faldara og har allir kvinnuligir býráðslimir eru útihýstir. Hetta fær tað at renna kalt omaneftir rygginum á einum kvinnuligum býráðlimi og ein annar er skelkaður



**SKELKAÐAR**

*Tær báðir kvinnuligu býráðslimirnir í Havn, Elin Lindenskov, vm og Marin Katrina Frýdal, eru skelkaðar av framferðini hjá monnunum í Tórshavnar býráð*

Áki Bertholdsen

Kvinnuligir býráðslimir í Havn føla seg alvorliga traðkaðar á.

Tórshavnar Býráð hevur gjørt ein flottan faldara, har tað verður skorið út í papp, hvat sjálvt virðisgrundarlagið undir arbeiðnum í Tórshavnar Kommunu skal vera.

Men á teimum aftastu síðunum í litfagra faldaranum tróna fýra býráðspolitikarar brádliga fram og greiða frá sínum framsjónum um Tórshavnar Kommunu og um, hvussu teir meta virðisgrundarlagið undir býráðsarbeiðnum.

Talan er um teir fýra menninar, Heðin Mortensen, Boði Andreasen, Jan Christiansen og Anfinn Brekkstein.

Sostatt er ikki so mikið sum skuggin av einum kvinnuligum býráðslimi at síggja í faldaranum.

### Skaðar trúvirðið

Hetta er rættiliga fallið kvinnuligu býráðslimum so illa fyri bróstið, at tær føla seg ordiliga traðkaðar á.

Bæði Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal staðfesta, at tær vistu onki um, at faldarin skuldi gerast upp á hendan mátan og at talan skuldi verða um eina politiska markering.

Tær hava onki ímóti, at virðisgrundarlagið undir kommunala arbeiðnum verður fest á blað.

Men tær eru sera misnøgdar um at ikki ein tann einasti kvinnuligi býráðslimur skuldi sleppa upp í part, tá ið talan nú eisini skuldi blíva um eina politiska merkering.

- Tær eru báðar samdar um, at ístaðin fyri at vísa virðisgrundarlagið undir býráðnum, er hetta beint einum orðaðum endamáli hjá býráðnum, sum er at virka fyri javnstøðu.

Tí halda tær, at hesin faldarin er skaðiligur fyri trúvirðið hjá kommununi.

## Nú skilji eg betri, hví ungar kvinnur ikki tíma at flyta heimaftur

### Taliban-býráð

Í eini vakstrarætlan fyri Tórshavnar Kommunu verður sagt, at vit skulu verða savningarstaðurin og atdráttarmegin í Norðuratlantshavi. Vit skulu eisini verða ein granskingarmiðdepil í Norðuratlantshavi sum skal draga ung húski og lærd fólk til Føroya at liva og virka, sigur Marin Katrina Frýdal.

- Faldarin hjá Tórshavnar Býráð vísir klárt og týðiligt, at á javnstøðuøkinum eru vit onga leið komin og hvør útbúgvin kvinna skal tíma at flyta heimaftur til eitt land, har sjálvt høvuðsstaðarkommunan so týðiliga vísir, at hon bara verður stýrd og myndað av monnum, spyr ein serstakliga ónøgd Elin Lindenskov.

- Hetta er ein niðurraðfesting av kvinnunum. Hetta er eitt tekin um, at í Tórshavnar Kommunu verða kvinnuligir býráðslimir ikki virdir. Hetta er eisini eitt tekin um, at leiðslan í Tórshavnar býráð hevur framvegis ikki skilt tíðina, vit liva í, leggur hon afturat.

## Hetta er eitt sindur hysteriskt

Marin Katrin Frýdal fer enn longri og sigur, at tað rennur henni kalt niðureftir rygginum, tí hesin faldarin minnir mest um eitt talibanstýri og hvør skal tíma at flyta heim til eitt slíkt samfelag.

- Signalvirðið í hesum faldaranum er fullkomiliga avskeplað og er beint ímóti orðingunum í vakstrarætlanini, sum eitt samt býráð nýliga hevur samtykt, staðfesta teir báðir kvinnuligu býráðslimirnir í Havn.

Marin Katrina Frýdal sigur, at hon fekk vissu fyri, at hesin faldarin bara var til innanhýsis brúk og at ein annar faldari skuldi gerast til alment brúk.

Men nú hevur Tórshavnar Kommuna kortini almannakunngjørt faldaran og tí staðfestir hon, at borgarstjórin hevur ikki hildið orð í hesum máli.

*aki@sosialurin.fo*

## Svara býtt aftur

Bæði Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal hava verið í sambandi við borgarstjóran í Havn, har tær hava gjørt vart við sína misnøgd um, at allir kvinnuligir býráðslimir eru útihýstir úr faldaran, har virðisgrundarlagið undir virkseminum hjá Tórshavnar Kommunu, verður staðfest.

Men Elin Lindenskov sigur, at vanliga reaktiónin hevur verið eitt býtt aftursvar og niðurgerðing, har gjøldur verður gjørdur burtur úr teimum, kvinnuligu býráðslimunum.

Onkur býráðslimur hevur enntá sagt mær, at hetta skulu vit ikki taka so tungt, tí aftanfyri hvønn góðan mann stendur ein góð kvinna.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á borgarstjóranum áðrenn blaðið fór til prentingar.

Men Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal siga, at í einum aftursvarið heldur Heðin Mortensen, at tær eru hysteriskar og biðjur tær sláa kalt vatn í blóðið.

- Hann hevur greitt okkum frá, at hetta er bara ein innanhýsis faldari og at vit skulu nokk sleppa upp í part, tá ein faldari skal gerast um vakstrarætlanina fyri Tórshavnar Kommunu, siga tær báðar.

Men tær staðfesta, at hetta er ikki meiri innanhýsis enn so, enn at faldarin er sendur øllum fjølmiðlum.

- Heðin Mortensen hevur staðfest, at faldarin er gjørdur fyri at savna starvsfólk og ikki fyri at seta split í av politikki, tí tað hoyrir ikki heima í einum slíkum faldara.

- Men hví so seta fýra mannligar býráðspolitikarar í faldaran. Hví so ikki seta eina mynd av øllum býráðnum, spyrja tær.